**Fiskimálaráðið**
*Fiskiveiðieftirlitið*

# Maskinstjórar til Fiskiveiðieftirlitið

Tvey størv sum maskinstjóri við skipunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum verða hervið lýst leys til setan sum skjótast gjørligt.

**Størvini fevna m. a. um hesar uppgávur:**
- Dagligu ábyrgdina av rakstri og viðlíkahaldi av øllum útbúnaði í maskinrúmunum og rúmum, sum beinleiðis hava samband við maskinrúm, umframt rúm har maskinútbúnaður er
- Dagligu ábyrgdina av viðlíkahaldi av øllum dekksmaskinum so sum spølum, kranum og davitum
- Dagligu ábyrgdina av viðlíkahaldsskipanum
- Annað fyrifallandi viðlíkahaldsarbeiði

**Førleikakrøv:**
- Vinnubræv sum Skipsmaskinstjóri *(STCW-regl. III/2 as Chief Engineer)*
- Heilsuváttan fyri sjófólk
- Leiðsluroyndir
- Góðan førleika at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- Góð samstarvsevni og hegni at fyriskipa

**Setanartreytir:**
Størvini eru tænastumannastørv og lønt í 31. lønarflokki sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Fiskiveiðieftirlitið.

Starvsheiti er maskinstjóri.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum, vinnubrævi og møguligum viðmælum, skulu vera Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi 19. juni 2003 kl. 12.00.

Umsóknirnar skulu sendast til :

**Fiskiveiðieftirlitið**
postsmoga 347
110 Tórshavn.

*Nærri upplýsingar um størvini kunnu fáast við at venda sær til Fiskiveiðieftirlitið tlf. 35 30 30 og tosa við Elmar Højgaard, deildarstjóra.*


## Hoyggjturkari



- Turkar 20' kontainara við vátum grasi uppá uml. 6-8 tímar
- Býligur í rakstri uml. kr. 20,- um tíman íroknað streym og dieselolju
- Tú kanst turka gras í oysandi regni fyri umleið kr. 20,- um tíman
- Kvalitetur og long livitíð
- Royndir í Føroyum við sera góðum úrsliti

**Seinasta freist at bíleggja fyri at náa levering til slátturin í ár er innan 01.06.03**

**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

Sosialurin 341800


# Pedagogar/hjálparfólk og vaskifólk

## til frítíðarskúlan Stoffalág 60

**Størvini:** eru 2 pedagogar 30 tímar, 1 hjálparfólk 20 tímar og 1 vaskifólk 15 tímar um vikuna. Arbeiðstíðin er í millum kl. 11.00 og 17.00. Tó vaskifólkið aftaná kl. 17.00.

**Stovnslýsing:** Á frítíðarskúlanum ganga 58 børn, 24 fyrrapart og 33 seinnapart.

**Tað er týdningarmikið:** at tit hava hug og áræði at skapa karmar til ein tryggan gerandisdag við umsorgan fyri tí einstaka barninum. Umsøkjarin skal kunna arbeiða sjálvstøðugt, vera røkin og førur fyri at taka avgerðir í arbeiðinum, og dáma væl at fara út við børnunum. Vit leggja dent á at vit eru eitt frítíðartilboð til børnini, har tey fáa møguleikar at spæla og vera saman við vinum.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett 11.08.03. Løn sambært sáttmálanum millum Føroya pedagogfelag og Tórshavnar kommunu og Havnar arbeiðskvinnufelag. Um pedagogar ikki søkja, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

**Umsókn** saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndum skulu vera frítíðarskúlanum í hendi seinast 16. juni 2003. Umsóknirnar skulu sendast til

**Frítíðarskúlan Skt. Frans**
Stoffalág 60
Box 3316
110 Tórshavn

**Meiri fæst at vita** um størvini við at venda sær til Mariu Heinesen, leiðara tlf. 314364/214364 ella Katrin Petersen, samskipara tlf. 315160.




## Føroya Koyriskúli

**Stanley Olsen tlf. 21 10 99**

Nýtt teoriskeið byrjar
týsdagin 10. juni kl. 17.30
á Suðuroyarvegi 11, tlf. 21 10 99
Teldupost: stanley@post.olivant.fo

Sosialurin 341800


Sosialurin

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** P/F 1008, P/F Vestlax, 350 Vestmanna.

**Viðtøkur broyttar:** 02.05.2003.
**Kapitalur:** Hækking við kr. 41.600.000,00 til kr. 42.100.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 25.000.000,00 til kurs 100 og kr. 16.600.000,00 við grunshækking.
**Nevnd:**
**Farin frá sum formaður:** Jógvan Ziska Djurhuus, Peder Andersensvej 1, DK-9850 Hirtshals.
**Innkomin sum formaður:** Suni Durhuus, Traðarvegur 19, 100 Tórshavn.
**Farin úr nevndini:** Ola Holen, Nakkevegen 21, N-6014 Ålesund og André Flem, Las Magnolias 55 Parque Ivian, Pto Varas, Chile.
**Innkomin í nevndina:** Bergur Poulsen, 620 Runavík og Odd Eliasen, Mørkin 8, 530 Fuglafjørður.
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Suni Durhuus, Traðarvegur 19, 100 Tórshavn.

*Skráseting Føroya tann 3. juni 2003*

*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3567
**Navn:** Sp/f 26.05.03.
**Adressa:** SMS, á Trapputrøðni, 100 Tórshavn.
**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 26.05.2003
**Viðtøkudato:** 26.05.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnarar:** Hans Waag, Dalatún 12B, 100 Tórshavn og Hilbert Dam, Blichervej 5, DK-8723 Løsning.
**Stjórn:** Hilbert Dam, Blichervej 5, DK-8723 Læsning.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum.
**Grannskoðari:** Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen, J. Paturssonargøta 18, 100 Tórshavn.
**Rokskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta rokskaparár:** 26.05.2003 - 31.12.2003
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka handil, keyp og søla og annað virksemi í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 3. juni 2003*

*Kristin Balle*



**Fiskimálaráðið**
*Fiskiveiðieftirlitið*

# 1. meistarar til Fiskiveiðieftirlitið

Tvey størv sum 1. meistarar við skipunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum verða hervið lýst leys til setan sum skjótast.

**Størvini fevna m. a. um hesar uppgávir:**
- Vaktgangandi maskinmaður sambært ásetingunum frá maskinstjóra
- Skipa fyri og luttaka í dagliga arbeiðinum í maskinrúmunum, og rúmum sum beinleiðis hava samband við maskinrúm, umframt rúm har maskinútbúnaður er
- Skipa fyri viðlíkahaldi sambært viðlíkahaldsskipan
- Annað fyrifallandi viðlíkahaldsarbeiði

**Førleikakrøv:**
- Vinnubræv sum Skipsmaskinstjóri *(STCW-regl. III/2 as Chief Engineer)* ella vinnubræv sum Skipsmaskinmeistari á 1. stigi *(STCW-regl. III/2 as 2nd Engineer)* við útbúgving, sum gevur rætt til vinnubræv sum Skipsmaskinstjóri.
- Heilsuváttan fyri sjómenn
- Leiðsluroyndir
- Góðan førleika at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- Góð samstarvsevni og hegni at fyriskipa

**Setanartreytir:**
Størvini eru tænastumannastørv og lønt í 28. lønarflokki sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Fiskiveiðieftirlitið.

Starvsheiti er 1. meistari.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum, vinnubrævi og møguligum viðmælum, skulu verða Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi 19. juni 2003 kl. 12.00.

Umsóknirnar skulu sendast til:

**Fiskiveiðieftirlitið**
postsmoga 347
110 Tórshavn.

*Nærri upplýsingar um størvini kunnu fáast við at venda sær til Fiskiveiðieftirlitið tlf. 35 30 30 og tosa við Elmar Højgaard, deildarstjóra.*

**Fiskimálaráðið**
*Fiskiveiðieftirlitið*

# 2. meistarar til Fiskiveiðieftirlitið

Trý størv sum 2. meistarar við skipunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum, verða hervið lýst leys til setan sum skjótast.

**Størvini fevna m. a. um hesar uppgávur:**
- Vaktgangandi maskinmaður sambært ásetingunum frá maskinstjóra
- Luttaka í dagliga arbeiðinum í maskinrúmunum, og rúmum sum beinleiðis hava samband við maskinrúm, umframt rúm har maskinútbúnaður er
- Luttaka í dagliga viðlíkahaldinum sambært viðlíkahaldsskipan
- Annað fyrifallandi viðlíkahaldsarbeiði

**Førleikakrøv:**
- Vinnubræv sum Skipsmaskinmeistari á 1. stigi *(STCW-regl. III/2 as 2nd Engineer)* ella vinnubræv sum Skipsmaskinistur á 2. stigi *(STCW-regl. III/1 as Watchkeeping Officer)*
- Heilsuváttan fyri sjómenn
- Góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- Góð samstarvsevni og hegni at fyriskipa

**Setanartreytir:**
Størvini eru tænastumannastørv og lønt í 24. lønarflokki sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og deildir/stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Fiskiveiðieftirlitið.

Starvsheiti er 2. meistari.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipa til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum, vinnibrævi og møguligum viðmælum, skulu verða Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi 19. juni 2003 kl. 12.00.

Umsóknirnar skulu sendast til :

**Fiskiveiðieftirlitið**
postsmoga 347
110 Tórshavn.

*Nærri upplýsingar um størvini kunnu fáast við at venda sær til Fiskiveiðieftirlitið tlf. 35 30 30 og tosa við Elmar Højgaard, deildarstjóra.*

# SEV á fund við maskinmeistarar

**Maskinmeistarar halda fast við sína støðu viðvíkjandi sáttmálanum við SEV**

SEV
*Stefan í Skorini*

Tað er leiðslan í SEV, sum hevur biðið um fund við Maskinmeistarafelagið, har hon enn einaferð fer at umrøða sáttmálatrætuna við maskinmeistararnar.

Maskinmeistarafelagið tvíheldur um, at felagið hevur gjørt ein galdandi sáttmála og noktar at samráðast av nýggjum, hóast Karsten Hansen ikki góðkennir sáttmálan vegna ov stóra lønarhækking.

– Vit hava undirskrivað ein sáttmála, og tað er ikki okkara trupulleiki, at SEV ikki hevur havt sítt bakland í lagi, sigur Jógvan Nybo, formaður í Maskinmeistarafelagnum.

SEV hevur hinvegin ført fram, at felagsskapurin ikki kann flyta lønir eftir einum sáttmála, sum ikki er góðkendur í Fíggjarmálaráðnum. Støðan var undan fundinum so fastlæst, sum hon kann vera.



*Jógvan Nybo lurtaði í gjár, mikudagin, enn einaferð eftir sjónarmiðunum hjá SEV*